

*Nýggj mynd av brúnni um Streymin. Stórar broytingar eru farnar fram hesi 35 árini*

*Jens Kristian Vang*

# Brúgvin um Streymin 35 ár

Í dag, 30. oktober, eru liðin 35 ár síðan brúgvin um Streymin varð latin upp fyri almennari ferðslu. Atli Dam, sum var løgmaður, kvetti snórin, ið varð spentur tvørtur um brúnna. Arbeiðið við at gera brúnna byrjaði í mars 1971.

Brúgvin er 220 metrar long og 9,5 metrar breið. Koyribreytin er 7 metrar breið og báðumegin er smøl gongubreyt, 1 metur breið. Mitt undir brúnni er siglingarrenna, ið er 25 metrar breið og klødd við bullverki. Siglingarhæddin er á kyrrindum 17 metrar.

Byggifelagið E. Pihl & Søn, stóð fyri arbeiðinum at gera brúnna og Landsbyggifelagið hevði eftirlitið. Felagið Rambøll & Hannemann teknaði og projekteraði. Kostnaðurin varð umleið 13 milliónir krónur.

Teir sum hildu røður hendan dagin vóru: Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur, Petur Zachariasen, bygdaráðsformaður, úr Streymnesi, Jógvan Mørkøre, bygdaráðsformaður á Eiði, og Atli Dam, løgmaður.

*Kelda: Myndaárbókin Árið ið fór 1973*



*Myndin er tikin beint eftir at brúgvin varð latin upp fyri almennari ferðslu. Leggið til merkis at vegurin niðan til bergholið ikki er gjørdur*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir